# Um haru

Snjóhara (*Lepus timidus*) varð innflutt til Føroya í august 1855 og apríl 1958 úr Kragerø í Oslofjørðinum – 4 hvørja ferðina. Tær vórðu settar út í Hornabø og runnu niðan á Kirkjubøreyn. Tær vuksu skjótt í tali og vórðu síðan fluttar til allar hinar oyggjarnar uttan Koltur og Lítlu Dímun; haran fekst tó ongantíð at støðast í Stóru Dímun.

Hara, sum er eitt gnagdjór, er 46-61cm long og vigar í miðal 2.7kg. Hon leggur tríggjar ferðir um árið og gongur kviðin í einar 7 vikur. Tveir til tríggir ungar eru í hvørjari løgu. Kortini er sjáldan, at veðrið er so gott, at allar tríggjar løgurnar koma undan. Ungarnir eru kynsbúnir, tá ið teir eru 8 mánaðir gamlir, og tað hevur við sær, at ársgamlar harur leggja.

Haran etur grøs, stør, urtir og trøllakampar, harafturat knubbar og endaknappar á runnum og trøum. Tær eru virknastar í skýmingini, men í makingartíðini síggja vit tær eisini renna hvør eftir aðrari um dagin.

